# Viðfestivognar

Brenderup

Vár mest seldi viðfestivognur í Føroyum í 2002.
Vit hava Føroya størsta og besta úrval av vognum á goymslu. Stórir, smáir, innilokaðir, vippuvognar, bátavognar, o.s.fr.

Vognar eru eisini á goymslu hjá **Balslev** í Havn, **D.J. Enni** á Tvøroyri og **Klaksvíkar Timburhandil.**



**Pf HANSEN**
Telefon 44 71 42 - 21 85 40


**Vágs kommuna**

# Leiðari, pedagogar og hjálparfólk

## til nýggja Dagstovnin og Frítíðarskúlan í Vági

**Vágs kommuna søkir við hesum eftir leiðara, pedagogum og hjálparfólkum til nýggja Dagstovnin í Vági, sum letur upp í august mánað 2003.**
**Somuleiðis verður søkt eftir pedagogi til frítíðarskúlan.**

**Vit vænta**
At tú:
- Hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgum
- Er álítandi, kann arbeiða sjálvstøðugt, er førur fyri at taka avgerðir í arbeiðinum
- Dámar at vera úti saman við børnunum

**Lønarviðurskifti:**
Størvini verða sett eftir avtalu, sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meira fæst at vita**
um størvini, við at venda sær til kommunuskrivstovuna telefon 373024.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og møguligum viðmælum skulu vera Vágs kommunu í hendi í seinasta lagi 20. juni 2003.

Viðmerk á brævbjálvan »starvsfólk«

**Vágs kommuna**
**Mentanarnevndin**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 3561
**Navn:** P/F Frá 14. mai 2003
**Adressa:** Ægishædd 9, 100 Tórshavn
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 14.05.2003
**Viðtøkudato:** 14.05.2003
**Kapitalur:** Kr. 20.000.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 20.000.000,00 í øðrum viðrum til kurs 100.
**Stovnari:** Adam Madsen, Ægishædd 9, 100 Tórshavn.
**Nevnd:** Magnus S. Petersen, Oman Hoydalar 3, 188 Hoyvík (formaður), Adam Madsen, Ægishædd 9, 100 Tórshavn og Turið Weihe Madsen, Ægishædd 9, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Adam Madsen, Ægishædd 9, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra saman við nevndarformanninum.
**Grannskoðari:** Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 14.05.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at eiga partar í vinnufyritøkum, reka handil, framleiðslu, íløguvirksemi og annað yrki í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 15. mai 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3563
**Navn:** Sp/f Hugin
**Adressa:** Heiðatún 3, 160 Argir
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 12.04.2003
**Viðtøkudato:** 12.04.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Helgi Rasmussen, Sangfuglestien 13, 2th., DK-2400 København NV og Steinbjørn Hardlei, Heiðatún 3, 160 Argir.
**Nevnd:** Helgi Rasmussen, Sangfuglestien 13, th., DK-2400 Køvenhavn NV (formaður) og Steinbjørn Hardlei, Heiðatún 3, 160 Argir.
**Stjórn:** Steinbjørn Hardlei, Heiðatún 3, 160 Argir.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóra, nevndarformanni ella tveimum nevndarlimum.
**Grannskoðari:** P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 12.04.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka ráðgevingar- og kunningarvirksemi, bókaútgávu, sølu og annað starv í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 15. mai 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3558
**Navn:** Sp/f Sonja Design
**Adressa:** Stoffalág 41, 100 Tórshavn.
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 02.04.2003
**Viðtøkudato:** 02.04.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnari:** Sonja á Lava, Stoffalág 41, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Kariann á Lava, í Lágni 20, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Grannskoðari:** P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 01.01.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handverk og allan handil, ið stendst av hesum. Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

*Skráseting Føroya tann 15. mai 2003*

*Kristin Balle*

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

# Varaleiðari til Útibarnagarðin í Miðvági!

Miðvágs kommuna søkir við hesum eftir varaleiðara til Útibarnagarðin í Miðvági, at byrja skjótast tilber.

Í Útibarnagarðinum ganga 22 børn í aldrinum 5 til 7 ár, og eru 5 starvsfólk knýtt at stovninum.

Eftir summarfrítíðina verður víðkað um tilboðið, til at fevna um børn, frá 3 ára aldri og til tey fara í skúla.

Vit ynskja okkum ein varaleiðara sum:
- er útbúgvin pedagogur
- hevur hugsjónir tá tað snýr seg um virksemi í einum útibarnagarði
- kann fara inn í leiðara funktiónina tá leiðarin er burturstaddur.
- hevur góð samstarvsevnir

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Elsu Margit Davidsen tlf. 223429.

Umsóknir vera, saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og møguligum viðmælum, at senda til Miðvágs kommunu, 370 Miðvági í seinasta lagi 30. mai 2003.

Kommunan skilar sær rætt til, um ikki nøktandi umsóknir eru, at lýsa starvið av nýggjum.


HESTPRENT



BØKUR, BØKUR, BØKUR
og alt annað prent

Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 314 555
fax 318 026
hestprent@hestprent.fo





Kaj Andreasen & Co
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

## Camp-lætt



- Góð frítíðarupplivilsir í fríari náttúru við Camp-lætt
- 3 minuttir tekur tað at gera Camp-lætt klárt
- Camp-lætt: Skilagóður kostnaður og trygt í ferðsluni
- Krevur lítið pláss at goyma

Sosialurin 341800



BOSCH
Makita



Á goymslu eru allar Bosch og Makita maskinur bæði til ídnað og lættari arbeiði

**Tórshavnar Maskinhandil**
v/ Tummas Andreasen
Varðagøta 29-30
100 Tórshavn - Tlf. 313442


# Sveisiarbeiði

Eg havi byrjað mína egnu fyritøku har alt sveisiarbeiði innan jarn, rustfrítt og alminium verður gjørt, bæði umvælingar og smærri arbeiði.

**Hevur hetta tín áhuga ring nátt sum dag.**
**Tlf. 422127/220957**
**LB Service**
v/ Lars Bisgaard

# Hondbóltsvenjari

Søkt verður eftir venjara til 1. kvinnulið hjá Søljuni til kappingarárið 2003/2004.

Skrivlig umsókn at senda til:

**Sandavágs Ítróttarfelag**
v/ Einu Gudmundsen
FO-360 Sandavágur

# Hondbóltsfelagið Tjaldur

Aðalfundur verður týsdagin 2. juni 03.

Tíð og stað verður lýst nærri.

**Nevndin**

# Frá Kollafjarðar Bátafelag

Aðalfundur felagsins verður í Felagshølinum mikudagin 4. juni 2003 kl. 19.30. Skrá sambært lógini.

**Nevndin**

Lesið Sosialin

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 3560
**Navn:** P/F Frá 12. mai 2003
**Adressa:** Ægishædd 9, 100 Tórshavn
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 14.05.2003
**Viðtøkudato:** 14.05.2003
**Kapitalur:** Kr. 20.000.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 20.000.000,00 í øðrum viðrum til kurs 100.
**Stovnari:** Adam Madsen, Ægishædd 9, 100 Tórshavn.
Nevnd: Magnus S. Petersen, Oman Hoydalar 3, 188 Hoyvík (formaður), Adam Madsen, Ægishædd 9, 100 Tórshavn og Turið Weihe Madsen, Ægishædd 9, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Adam Madsen, Ægishædd 9, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra saman við nevndarformanninum.
**Grannskoðari:** Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 14.05.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at eiga partar í vinnufyritøkum, reka handil, framleiðslu, íløguvirksemi og annað yrki í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 15. mai 2003*

*Kristin Balle*

# Gluggaglæma

## Søluframsýning í Müllers pakkhúsi

**Føroyskt handverk og listhandverk**
**13. - 21. september 2003**

Í døgunum 13.-21. sept. í ár verður skipað fyri forvitnisligari søluframsýning við livandi verkstaðum í Müllers pakkhúsi í Havn. Søluframsýningin ber heiti "Gluggaglæma" og er ein sjálvstøðug verkætlan undir Føroya Heimavirkis-felag. Vinnuframagrunnurin, Tórshavnar Kommuna og einstaklingar stuðla tiltakinum.
Endamálið við "Gluggaglæmu" er at skapa eitt nýtt og øðrvísi søluumhvørvi fyri tey, ið ynskja at koma longri á leið við handverkinum enn bert til dagdvølju ella ítriv. Somuleiðis at útvega teimum møguleika at fáa royndir innan nýggjar sølu- og framsýningarhættir.

**Müllers Pakkhús**
Müllers Pakkhús, sum partur av gomlu Havnini, er í sjálvum sær ein áhugaverdur bygningur. Húsið er nýliga umvælt og verður javnan nýtt til almenna móttøku hjá Tórshavnar Býráð. Ein søluframsýning av føroyskum hand- og listahandverki innan hesar sermerktu karmar fer ivaleyst at vekja ans hjá mongum.

**Livandi verkstaðir**
Framsýningin verður skipað sum eitt livandi verkstaðar-umhvørvi, har dygdargóðar vørur verða framleiddar, og har vitjandi fáa høvi til at síggja, hvussu vørurnar verða framleiddar. Hin einstaki framleiðarin fær somuleiðis eitt beinleiðis samskifti við keyparan, nakað sum kann geva honum royndir og íblástur til framhaldandi menning.

**Handverksgreinar**
Á søluframsýningini eru ymiskar handverksgreinar umboðaðar hvør á sínum avmarkaða øki: Binding - Vevnaður - Ull & Tøving - Træarbeiði - Leirlist -Horn & Bein - Skinn & roð - Jarnsmíð - Stein & Grót - Bátasmíð.

**Fjølbroytt skrá**
Umframt høvuðstáttin, livandi verkstaðir, verða fyrilestrar um evni, ið snúgva seg um føroyskt handverk. Annað til gamans verður kafé við heimabakstri, tónleikur, sangur, mótasýning v.m.

### Tilmelding: Innan 7. juni 2003

Hand- og listhandverkarar kring landið, ið ynskja at luttaka, verða bidnir um, innan 7. juni 2003, at venda sær til verkætlanarleiðara Randi S. Vang fartlf. 514265 ella t-post: ransiva@post.olivant.fo
Møguleiki er at melda seg sum luttakara í ein, fleiri ella allar dagarnar.
Kostnaður fyri luttøku er 400,-kr. um dagin.

**Framsýningin verður opin soleiðis:**

| | |
|---|---|
| Fríggjadag og leygardag | kl. 10.00 - 23.00 |
| Mánadag - hósdag og sunnudag | kl. 14.00 - 20.00 |

<ph_1>

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo